## Navnið Løðan ?

Hví nevna eitt virkið "Løðan", hvørs endamál er at bøta uppá tann sálarliga partin hjá menniskjum ?

Navni **Løðan** kemur av orðinum Løða. Hyggja vit í orðabókina so eru ymiskar merkingar.

Í fyrstu merkingini er ein Løða eitt goymsluhús til hoyggj, korn og tílíkt.

Ein onnur merking av Løða er at ferma, fylla á ella í.

Um vit síggja burtur frá, at eigarin av virkinum hevur "**í Løðu**" til eftirnavn, og hugsa um tann sálarliga partin hjá menniskjanum og gera eina roynd, at samantvinna hendan partin við navnið, ja so kann okkara sálarliga goymsla væl líknast við eina Løðu. Tað er jú ígjøgnum alt okkara lív, vit við góðum og ringum upplivingum, fylla okkara sálarligu **Løðu**.

Fyri at fáa pláss fyri nýggjum vørum, var í gomlum døgum neyðugt at rudda ella seta uppá pláss í Løðuni. Somuleiðis er við okkara sálarligu goymslu, har tað av og til kann vera neyðugt at seta uppá pláss og rudda fyri at koma víðari ella fáa eitt betri lív.

Seinna merkingin kann eisini sipa til tað, ið er aðalmálið við mínum virki, sum er við samrøðum og ráðgeving at **løða** uppaftur tey menniskju, ið hava sálarligan tørv á tí.